fj



# SAMSKIPARI TIL UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Starvið**
Uttanríkis- og mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum samskipara. Talan er um eitt fulltíðarstarv í einum spennandi arbeiðsumhvørvi. Viðkomandi verður partvíst við til at mynda starvið, men er eisini í toymi við aðrar samskiparar í ráðnum, sum avloysa hvønn annan eftir tørvi. Starvið verður sett 1. november 2021 ella sum skjótast. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar, og tú fært møguleika at menna teg bæði fakliga og persónliga á fleiri mótum.

**Samskiparin røkir m.a. hesar uppgávur:**

- Fyrireika arbeiðið við dátutrygd (Wired Relations)
- Avhending av journal
- Fyrireika og halda skeið á journaløkinum
- Partvíst bókhald
- Stuðulsumsiting
- Verða við á fundum og skriva fundarfrágreiðingar
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur í deildunum á Tinghúsvegnum
- Málsviðgerð
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til samskiparan
- Aðrar umsitingarligar uppgávur og rættlestur
- Annað

**Førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur hollar royndir í skrivstovuyrkinum og innlit í almenna fyrisiting. Harumframt ynskja vit ein persón, sum:

- Arbeiðir sjálvstøðugt
- Er røkin og fyrikomandi
- Hevur eitt jaligt, ágrýtið arbeiðslyndi
- Megnar at arbeiða undir tíðartrýsti og ofta við fleiri uppgávum í senn
- Kann rættlesa føroyskt, og annars dugir væl danskt og enskt
- Hevur góð samstarvsevni og fegin tekur eyka tøk, tá ið tørvur er á tí

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður flokkað eftir førleikum sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Setanarøkið fevnir um Uttanríkis- og mentamálaráðið og stovnar undir tí. Bygnaðarliga er starvið á Aðalskrivstovuni við virksemi í mun til Mentanardeildina og Útbúgvingardeildina.

**Nærri kunning um starvið**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tel. 555010 at fáa nærri upplýsingar.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum, lívsrensli (c.v.) o.ø. skal sendast við telduposti til **ummr@ummr.fo**

Umsóknir skulu vera Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **týsdagin 28. september 2021**. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Uttanríkis- og mentamálaráðið** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita uttanríkismál, undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Sí nærri á heimasíðu ráðsins www.ummr.fo*